# Formlig krøv fyri stuðli til høvuðsøki 2

Tórshavn 10. juni 2014

**Endamál**
Sambært løgtingslóg nr. 44 frá 8. mai 2012 um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd § 1 er endamál grunsins *at veita stuðul til átøk og verkætlanir, sum kunnu menna heilsuøkið í Føroyum, men sum ikki eru ein partur av rakstrinum av heilsuverkinum annars.*

**Høvuðsøki 2**
Skilmarking í leiðreglunum:

"Stuðul til gransking og menning innan raðfest økir, sum kunnu menna heilsuøkið í Føroyum

Kappingarjáttan til gransking og menning á fimm raðfestum økjum, har t.d. epidemiologi og ílegugransking, kunnu innganga í hvørt einstakt øki, eins og t.d. menning av nýggjum tilgongdum, skipanum ella tænastum.

**Raðfest øki (nevnt í bókstavraðfylgju):**

- Heilsa – sum sosialt fyribrigdi, at kanna tey sosialu viðurskifti sum ávirka heilsu og sjúku og hvussu sosialir trupulleikar sum fylgja av sjúku kunna bøtast. Her kunna samfelagsviðurskifti og ávirkanin á heilsustøðu verða greinað.
- Heilsa – sum medisinskt fyribrigdi, at kanna tey medisinsku viðurskifti sum ávirka heilsu og sjúku, td. autoimmunar sjúkur, neurodegenerativar sjúkur og giktasjúkur.
- Hjartasjúkur, gransking / kanning av sjúkum í hjarta og blóðrensli, atvoldin til hjartasjúkur, fyribyrging og viðgerð.
- Krabbamein, epidemiologiskar kanningar / gransking innan krabbameinsøkið
- Sálarfrøðilig heilsa, gransking og kanningar innan sálarsjúku og fyribyrgjandi tiltøk."

**Treytir**
Granskari kann saman við stovni í Føroyum søkja um stuðul til gransking og menning.

Stuðul kann veitast til smærri verkætlanir, samstarvsverkætlanir, ph.d.verkætlanir og post.doc. verkætlanir innan raðfestu økini.

Miðað verður eftir at býta avsetta stuðulin til hetta høvuðsøkið nøkulunda javnt millum áðurnevndu raðfestu økir.

Atlit skal takast til, at stuðulin skal gagna øllum økjum í landinum.

**Formlig krøv til umsóknir**

Umsóknin skal skrivast á serstakt umsóknarblað, og latast inn umvegis teldupost gransking@gransking.fo áðrenn 1. september, kl. 12. Umsókn, sum kemur ov sent, verður ikki viðgjørd.

Umsóknarblaðið við kravdum fylgiskjølum skal savnast í eitt pdf-skjal. Forritið www.pdfmerge.com kann brúkast til hetta.

Saman við umsóknarblaðnum skulu hesi fylgiskjøl vera við:

1. Verkætlanarlýsing (í mesta lagi 10 síður) íroknað hesi punkt (um viðkomandi):
    a. Almenn grundgeving, t.e. hvønn almennan týdning umsøkjarin metir verkætlanina hava
    b. Faklig grundgeving, t.e. hvønn fakligan týdning umsøkjarin metir verkætlanina hava
    c. Væntað úrslit av verkætlanini, íroknað varðar og veitingar
    d. Arbeiðsháttur og ástøði, t.e. hvussu umsøkjarin ætlar sær at fara til verka í fakligum høpi
    e. Møguligir etiskar spurningar um t.d. royndarpersónar ella viðkvæmt tilfar verða nýtt
    f. Upplýsingar um granskingina ella menningina higartil á økinum við viðkomandi tilvísingum
    g. Upplýsingar um tilfar, t.e. keldutilfar, spurnabløð v.m.
    h. Knýti til aðrar verkætlanir
    i. Altjóða samstarv og sambond
    j. Almannakunngerð og gagnnýtsla av verkætlanarúrslitum

2. Talva við arbeiðs- og tíðarætlan fyri hvørt kalendaraár, íroknað varðar og veitingar (a,iii)

3. Talva við útgreinaðari fíggjarætlan fyri hvørt kalendaraár - skal samsvara við høvuðstølini, sum standa í teigi 12

4. Curriculum Vitae (CV). Av týðandi punktum í CV eru útbúgving umsøkjarans. Fyri post doc. verkætlanir eru haraftrat granskingarroyndir (luttøka í/leiðsla av størri granskingarverkætlanum), granskingarstuðul og vísindaligar útgávur av týdningi

5. Frásøgn frá komandi ph.d.vegleiðara viðvíkjandi granskingarførleika umsøkjarans, formlig váttan um vegleiðing og CV hjá viðkomandi

6. Próvskjøl hjá umsøkjara (á universitetsstigi)

7. Ummæli frá stovninum/virkinum, har verkætlanin skal fara fram, um, hvussu verkætlanin sampakkar við granskingarstrategi og- profil hjá stovninum

Umsóknarblaðið og verkætlanarlýsingin mugu skrivast á donskum/norskum ella enskum, tí umsóknin skal til fakliga meting uttanfyri Føroyar (fyri verkætlanir, har søkt verður um meira enn kr. 300.000 í stuðli) – sí www.gransking.fo/Default.aspx?pageid=2373

Formliga skulu bæði ein stovnur/virki og ein verkætlanarleiðari standa sum umsøkjarar. Í teigi 2 skal standa navn á annaðhvørt stovns-/virkisleiðara ella øðrum leiðara við heimild at binda stovnin/virkið. Í teigi 3 skal standa navn á verkætlanarleiðara. Báðir persónar skulu undirskriva umsóknarblaðið.

Tann, sum skal gera arbeiðið, skal sum minstamark hava masterútbúgving (3 + 2) frá viðurkendum universiteti.

Er talan um ph.d.lestur, skal høvuðsvegleiðarin vera á lektara ella professarastigi. Høvuðsvegleiðarin skal vátta granskingarførleikarnar hjá ph.d.umsøkjaranum.

Er talan um annað slag av verkætlan, har umsøkjarin ikki hevur skjalprógvað granskingarførleikar, er kravt, at persónur við granskingarroyndum er formliga knýttur at verkætlanini.

Sum meginregla verður í mesta lagi latin stuðul til 2/3 av verkætlanini. Í heilt serligum føri kann verða latið upp til 100% í stuðli til granskingarverkætlanir fíggjaðar úr Sjúkrakassagrunninum. Viðfígging frá øðrum gevur fyrimun.

Allur játtaður stuðul skal nýtast í Føroyum, undantikið útreiðslur til ferðing, skeið og ráðstevnur.

Overhead (endurgjald fyri óbeinleiðis útreiðslur) kann í mesta lagi vera 10% av lønarútreiðslunum.

Minsta stuðulsupphædd, sum kann veitast til hvørja verkætlan innan raðfestu økini, er kr. 150.000 og latast kann í mesta lagi kr. 1.500.000.

Partur av aðrari fígging kann vera eginfígging, sum eitt nú arbeiði lønt av stovni ella virki, útvegan av amboðum, eitt nú rannsóknarstovutíð, rannsóknarroyndir og annað knýtt beinleiðis at aktuellu verkætlanini. Ólønt arbeiði verður ikki góðtikið sum eginfígging.

Granskingarnevndin avger, hvørt talan er um granskingarverkætlan og hvør fígging kann góðkennast.

Lønir skulu fylgja galdandi føroyskum sáttmálum.

Tað ber bara til at fáa stuðul til eina verkætlan í senn. Hetta skal skiljast soleiðis, at um søkt verður um stuðul til nýggja verkætlan, so verður møguligur stuðul til nýggju verkætlanina treytaður av, at fyrra verkætlanin verður liðug fyrst við nøktandi úrsliti.

Játtan um stuðul úr Sjúkrakassagrunninum er treytað av, at stuðul verður játtaður til alla verkætlanina. Tá vissa er fingin fyri, at allur stuðulin er tøkur, verður sáttmáli millum stovn/virki, verkætlanarleiðara og Granskingarráðið undirskrivaður. Fyrsta ávegis gjaldið kann latast, tá sáttmálin er undirskrivaður og klárt er at fara undir verkætlanina.

Tað ber til at fáa stuðul til verkætlan, sum er í gongd, áðrenn umsóknarfreistina hjá Sjúkrakassagrunninum, men játtanin úr Sjúkrakassagrunninum kann bert brúkast til útreiðslur, sum liggja aftaná játtanardagin.